# Sálin á Verkstaðnum

**Hóast Grafiski Verkstaður Føroya nú flytur í nýggj høli, er ongin vandi á ferð, tí verkstaðurin hevur sína egnu sál. Kinna Poulsen, listfrøðingur, lítur aftur á 10 ár á gandakenda verkstaðnum**

## Afturhvarv



Kinna Poulsan

Nú leygardagin verður almenn upplating av Grafiska Verkstaði Føroya á nýggja búðstaðinum á Skálatrø í gomlu fabrikkini hjá Østrøm. Nýggju hølini eru stór og vøkur, eins og nýggja útsýnið yvir Vestaru Vág, Vágsbotn og Tinganes er nakað væl vakrari enn tað gamla yvir á stadionøkið. Eg gleði meg til leygardagin og til at síggja tey fyrstu prentini, sum Tóroddur Poulsen fer at gera á nýggja verkstaðnum, men fari áðrenn at loyva mær at kaga aftur í tíð til gandakendar løtur í Gundadali seinastu 10 árini.



*Rannvá Kunoy á verkstaðnum*

### Farvæl til fótbóltin

Heili níggju ár eru flogin framvið, síðani Per Kirkeby arbeiddi á verkstaðnum í 2000. Hann lýsir í síni bók um ferðina til Føroya millum annað útsýnið í Gundadali:

"Værkstedet lå i Tórshavn. Et anneks til det færøske kunstmuseum. Jeg arbejdede mest i et lille rum, nærmest en entré til værkstedet... I denne entré stod jeg og tegnede på de litografiske sten. Færøerne lå uden for døren. Men når jeg lukkede døren op og kiggede ud, var der kun fodbold. Hele døgnet blev der spillet på stadionanlæggets baner lige udenfor. Gik man lidt op ad veje, så man ud over Tórshavn og Nolsøs karakteristiske profil. Der var en sådan præcision og geologisk logik i den streg, at jeg blev henrykket ved hvert blik."

Júst Kirkeby er dømi um samtíðarliga heimslist á hægsta støði, sum vit í ríkum máti hava havt høvi at uppliva á Grafiska Verkstaði Føroya tey tíggju árini, verkstaðurin hevur virkað.



*Jan Andersson í ferð við at valsa ein stein*



*Zacharias Heinesen, Tróndur Patursson og Claus Carstensen í veitslulagi*



*Fríða ger forsíðu til Vencil*



*Tóroddur Poulsen og ein vandamikil grindalykkja*



*Jan vísir børnunum ein litografiskan stein*

### Professjonalisma og blíðskapur

Tað var, havi eg skilt, Bárður Jákupsson, sum tá var stjóri í Listasavni Føroya, ið átti upprunaliga hugskotið til at gera ein grafiskan verkstað í Føroyum. Hesin skuldi vera eitt tilboð til bæði føroysk og útlendsk listafólk, ið høvdu hug at arbeiða við steinprenti í Føroyum. Ein hugsan var eisini, at verkstaðurin skuldi vera eitt stað, har føroysk og útlendsk listafólk kundu hittast soleiðis, at Grafiski Verkstaður Føroya skuldi vera við til at knýta samband og samstarv millum listafólk tvørtur um landamørk.

At hetta er framúr væl eydnað við íblástri til allar síður, kemst fyrst og fremst av teimum báðum, Jan Andersson og Fríðu Brekku, sum varða av verkstaðnum og teirra serliga evni at sameina yrkisliga professjonalismu og gestablídni, ið mong av listafólkunum hava verið takksom fyri. Í eini grein um verkstaðin, sum Bárður Jákupsson skrivaði í myndaskránni til framsýningina "Tryk" á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn fyri fimm árum síðani, leggur hann sostatt dent á førleikar Jan Anderssons, bæði hansara framúrskarandi yrkisførleikar sum litografur, men eisini hansara frálíka innlivingarevni í mun til hvat tey (sera) ymisku listafólkini ætla og vilja.

### Gandaløtur

Sjálv havi eg havt ómetaliga nógvar góðar og kveikjandi løtur á Grafiska Verkstaði Føroya saman við Jan og Fríðu og ymiskum listafólkum,